# Ritan er gauv, men ...




*Nú Ritan er til umvælingar røkir Silja Star úr Vestmanna ferðasambandið. Fólk eru nøgd við hetta, men ynskja eina nýggja Ritu*

*Mynd: Jens Kr. Vang*



*Hóast Ritan er meiri enn 35 ára gomul, er hon kortini besta skipið hjá nólsoyingum. Mong ynskja hana aftur – men bert fyri eitt styttri skeið: Farast má undir eina nýggja Ritu sum skjótast!*

**Uttan sjóvegis sambandið vóru nólsoyingar púrasta avskornir frá umheiminum. Í løtuni røkir Silja Star hesa siglingina, meðan bíðað verður eftir Rituni , sum er til umvælingar**

SAMFERÐSLA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Nólsoy:** - At sigla við Silju er sum at sita í einum bussi. Hetta er tað reina luksus!, sigur ein nólsoyarkona.

Hon er á veg til Havnar einihvørji ørindi henda vakra og stilla hósdagin í farnu viku.

Fólkið í oynni man vita alt um, hvat tað vil siga at ferðast um Nólsoyarfjørðin í ringum líkindum. Men henda dagin er eingin orsøk at hugsa um slíkt.

Silja Star leggur frá landi í Nólsoy kl. 9:55 stundisliga. Komin út um brimgarðin verður ferð sett á og skúmandi verður kósin sett móti høvuðsstaðnum. Hetta letur seg væl gera ein slíkan dag, tí kyrt er í sjónum og streymurin lítil.

Einar 7 minuttir seinni verður slakað av aftur. Molin í Havn kemur undan kavi og lítla løtu seinni kann ferðafólkið trygt fara í land við Bursatanga í Havn.

Soleiðis hevur lagið verið í eina tíð, samstundis sum Ritan hevur verið til umvælingar.

Sum nevnt í blaðnum leygardagin eru fólk í oynni fegin um hesa loysnina. Tey eru tó fult vitandi um, at Silja Star bert kann røkja hesa siglingina um summarið.

- Eingin hugsingur er um, at Silja kann sigla um Nólsoyarfjørð á hávetri. Tá mugu vit hava Rituna aftur.

- Ritan er gauv, men er kortini ikki nøktandi sum ferðamannaskip í framtíðini. Vit ynskja eitt annað og betri far, sigur ein annar nólsoyingur á bryggjuni.

Ein arbeiðsbólkur í Nólsoy arbeiðir við hesum málinum, men enn dugir eingin at siga nær eitt nýtt skip fer at sigla um Nólsoyarfjørð.

Árstalið 2009 er nevnt. Tað krevur hinvegin at peningur skal játtast, soleiðis at farast kann undir prosjekteringina sum skjótast.

## Tíðin farin

Seinastu mongu árini hevur Ritan røkt hesa farleiðina. Ritan er smíðað í 1971, og hevur tænt væl hesi mongu ár sum sambindingarlið hjá oyggjarfólkinum við høvuðsstaðin.

Nólsoyingar og onnur ferðandi eru helst neyvan í iva um, at nú eru árini runnin undan henni og tískil